


Eitt fegið EB/Streymalið eftir at hava ført fyrsta veruliga steypið í hús




Sjálvandi fekk venjarin obligatoriska lufttúrin, tá sigurin var tryggjaður

HB-málið.

Og tá tíðin var um at renna út, mátti John Heri Dam berast av vølli við einum snuddi, men hann kom tó inn aftur tá seinni hálvleikur byrjaði.

Í yvirtíðini av fyrra hálvleiki fekk HB tríggjar góðar møguleikar, men fyrst bjargaði René Tórgarð í tveimum umførum royndum frá Andrew av Fløtum, og eftir fylgjandi hornasparkið hevði hann enn eina stórbjarging, sum helt HB rættiliga frá fatinum.

Og René Tórgarð helt fram í øðrum hálvleiki, sum var ikki meiri enn byrjaður, tá hann stórbjargaði eftir, at Andrew gjørdist leysur í brotsteiginum.

Eftir hetta gekk spælið rímiliga javnt á. Lotið, sum lá langs eftir vøllinum, bara vaks, og tað hjalpti HB at trýsta spælið fram móti EB/Streymamálinum. Hetta førdi í longum løtum til eitt trýst móti málinum, men í alt ov stóran mun var talan um eitt planleyst trýst, tí HB-leikararnir vóru ov óneyvir.

HB hevði fleiri skot á málið hjá René, men skutu teir ikki framvið málinum, endaði bólturin í føvningini um hjá EB/Streym-málverjanum. Og tað var ikki altíð tí, at hann mátti út í tær spektakuleru bjargingarnar.

Havnarliðið hevði somuleiðis ofta trupult við at stýra uppspælinum, tí vindurin gjørdi, at bólturin hevði hug at renna undan leikarunum. Men tá 77 minuttir vóru farnir, bragdaði endiliga hjá HB. Ein bóltur kom inn úr høgru síðu, og har stakk Páll M. Joensen seg fram, og hóast tað luktaði langan veg av rangstøðu, eydnaðist tað endiliga at fáa bóltin inn um René Tórgarð.

## Vassaðu í møguleikum

Nú kundi ein vænta eitt øgiligt trýst frá HB-liðnum, men áðrenn hetta veruliga kom í gongd, tók Hans Pauli sær aftur um reiggj. Hann hevði verið rættiliga anonymur í seinna hálvleiki, men stutt eftir HB-málið, gjørdi hann eitt raid fram eftir í vinstur síðu, og legði síðani bóltin inn til ein heilt blankan Károly Potemkin, og hann sveik ikki álitið. 4-1 og nú mundu tey flestu halda, at dysturin var avgjørdur við bert tíggju minuttum eftir av vanligu leiktíðini.

Men fyri triðu ferð innan seks minuttir mátti ein bóltur pilkast úr netmeskunum. Hesaferð var tað Rógvi Jacobsen, sum skamt uttanvert brotsteigin høggur til, og bólturin sat í tríkantinum uttan nakran møguleika hjá René at bjarga. Næsta avgjørda perlumálið í dystinum.

At døma eina steypafinalu man vera eitt tað størsta ein dómari kann uppliva í føroyskum fótbólti. Og tað var tað helst hjá Eileri Rasmussen. Men um hann rokn-ar hesa somu finalu sum sítt besta avrik, er meiri ivasamt. Tí satt at siga kundi dømingin verið væl betri.

Tá HB-leikari varð feldur, sóu allir áskoðarar hetta greitt at vera uttanfyri mark, so at siga. Kortini dømdi Eiler brotsspark, og ikki fyrr enn eftir kjakan aftur og fram við EB/Streymaleikarar, ráðførdi dómarin seg við linjuverjan – ella hjálpardómaran, sum tað nú eitur. Úrslitið var eitt frísparк uttanfyri brotsteigin, sum tað jú átti at vera av fyrstan tíð.

HB-leikararnir mundu í síðsta enda ikki verða so illa nøgdir við avgerðina, tí

## FAKTA

**Steypafinala í Gundadali**

**EB/Streymur-HB 4-3 (3-0)**
1-0 Soren Anghel (brts) (2)
2-0 Hans Pauli Samuelsen (5)
3-0 Arnbjørn Hansen (20)
3-1 Páll M. Joensen (77)
4-1 Károly Potemkin (79)
4-2 Rógvi Jacobsen (81)
4-3 Vagn Mohr Mortensen (85)

**EB/Streymur:** René Tórgarð – Marni Djurhuus, Egil á Bø, John Heri Dam, Bárður Olsen – Ronnie Samuelsen (Gert Hansen 71), Símun Eliasen, Hanus Eliasen, Hans Pauli Samuelsen – Arnbjørn Hansen (Károly Potemkin 25), Soren Anghel (Rafael Kwiecinski 85)
**Gult kort:** Marni Djurhuus, Ronnie Samuelsen, Hanus Eliasen
**HB:** Tróndur Vatnhamar – Poul Thomas Dam, Hans á Lag, Rasmus Nolsøe (Vagn Mohr Mortensen 30), Mortan úr Hørg (Páll M. Joensen 30) – Kári Nielsen, Rókur av Fløtum Jespersen, Milan Kulic (Ólavur í Ólavstovu 64), Rógvi Jacobsen, Jákup á Borg – Andrew av Fløtum
**Gult kort:** Páll M. Joensen, Ólavur í Ólavstovu
**Dómari:** Eiler Rasmussen, hjálpardómarar: Jens Albert Simonsen, Andreas Petur Hansen, 4. dómari: Lars Müller